LANDSROYND 6. flokkur

Føroysk fyrisøgn

apríl - mai 2013

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir í millum skákstrikurnar lisnir tvær ferðir. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Øll tekn eru tilskilað, bara punktum skulu lesast. Loyvt er næminginum at hava hjálparmiðlar við, t.d. orðabøkur og mállæru.)

# /Ross mítt/

/Mín áhugi **fyri rossum byrjaði/**, tá ið eg og ein **vinkona** mín/ **sóu** eina sera **vakra ryssu/** vesturi á Eiðinum/. Hon var reyðbrún við **longum brúnum faksi/**. /Vit hildu **hana vera/** so **flotta/** og **vitjaðu hana/ hvønn dag** í **langa tíð/**.

/Ein vetrardag, tá ið eg **hevði verið/** og **vitjað** vinkonu mína/, **skuldi** eg **fara/** at **síggja** ryssuna/ og **geva** henni **nakrar** gularøtur/. /Men tá **var** hon ikki **har/**. /Eg **minnist/**, /at eg **bleiv** so **kløkk/**. Mundi hon **vera sjúk/**? Eg **ringdi** til **mannin/, ið átti** ryssuna og **spurdi/**, **hvar** hon var/. Jú, hann **hevði tikið** hana/ heim í **fjósið** hjá sær/ og **sett hana**/ á bás **saman** við/ **einum øðrum hesti/** og eini **kúgv/.**

/-Har **stendur** hon í vetur/, /**segði** maðurin/. Eg fór ofta **yvir** til **mannin/** tann **veturin** at vitja ryssuna/, **meðan** hon **stóð** inni/. Eg fór ofta **um kvøldið/, áðrenn** eg fór í song/.

Tá ið ryssan kom út **aftur** á **bøin/ summarið eftir/**, **fór** eg **stuttar** ríðitúrar við henni/. **Men** tað var **eisini/ stuttligt** hjá henni at sleppa útaftur/ **aftan** á tann **langa** veturin/ í **myrka** fjósinum/. Tað var so **spennandi/**. Tað **einasta/**, sum eg **tosaði** um/, var um **ross/**, og at eg **ynskti** mær/ eina **ryssu/**, men mamma og pápi **vildu** ikki/.

/-Tað **tekur** so **nógva tíð/,** segði pápi/. - Betri er, um tú **ynskir** tær/ **okkurt annað**, segði mamma/.

/Fyrr vóru **rossini** í **Føroyum/** brúkt til tungt **arbeiði/**, tí tá vóru ongir **traktorar** og bilar/, men í dag eru **rossini** meiri sum eitt frítíðarítriv/.

/Eg **lærdi** rossini/ **ymisk** kynstur/. Tey **lærdu** at **bakka/**, eg lá **undir teimum/,** og eg kundi standa **uppi** á **teimum/** og **ymiskt annað/.**

/**Hetta** helt á í eini tvey ár/, og mamma og pápi **sóu/,** at áhugin var sera **stórur/**, og at eg **dugdi** væl/.

/Síðani **flutti** eg/ av **oynni** í skúla norðanfyri/ í eitt **hálvt** ár/ og **kundi** ikki **vera/** so **nógv/ saman** við **rossunum/.**

/Ein **sunnudag fyrst** í november/, **hugdi** eg á alnetið/, og **har** sá eg/ **tað fittasta/** eitt ára **gamla** ryssufylið/, sum **var** til sølu/. Konan, **ið átti tað/**, **búði** á Viðareiði/. Eg visti **bara/**, at hetta var tað **rossið/**, sum eg **vildi** hava/. **Tá ið** eg kom **norður/** og fór at **hyggja** at tí/, **visti** eg **beinanvegin/**, at hetta var júst mítt **ross/**. Eg **ringdi** til mammu og segði/, at **hetta** var/ tað **einasta rossið/,** sum eg **vildi hava/**.

/Tvær vikur **seinni/ stóð** tað fitta **fylið/** á beiti heima hjá **okkum/**. Tað er **flekkut/, hvítt** og brúnt/, júst sum eg **ynskti** mær/.

Eg **gav** tí navnið Flyksa/. **Navnið** er íslendskt/, og á **føroyskum/ merkir** tað flykra/.